VALGREINAR

# Eldrapolitikkur aftur á skránna

**Mikkjal Sørensen**
*valevni Javnaðarfloksins í Suðuroy*



10.000 krónur til støk og 16.000 krónur til hjún mánaðarliga í pensjón. Hetta er mál Javnaðarfloksins.

Sitandi samgonga hevur nýtt nógva orku og nógvan pening til eitt nú fullveldismálið. Og tað er ikki ókent, at setir ein alla orku, allan peningin, á eitt stað, so er vandin at missa sera stórur.

Og málini eru mong, ið eru dottin á gólvið í navni fullveldisins.

Eitt nú hevur sitandi samgonga ikki havt stundir at tikið sær av okkara eldru, tí orka hevur verið løgd í orrustur við danir, uttan stórvegis úrslit.

Men okkara gomlu, tey ið undan fóru og løgdu lunnar undir okkara framkomna samfelag, hava verið við skerdan lut síðstu fýra árini.

Bráðfeingistørvurin er sostatt stórur. Javnaðarflokkurin hevur tí sett sær fyri at, at neyðugar íløgur til 160 nýggj røktarheimsplás komandi fýra árini verða settar av á fíggjarlógini. Landskassans partur verður umleið 80 milliónir krónur í fýra ár.

Fleiri og fleiri eldri liggja einsamøll og óhjálpin heima, tá heimahjálpin fer eftir seinastu dagligu vitjanina.

Tí vil Javnaðarflokkurin beinanvegin útbyggja heimarøktina við einari døgnrøkt við tilkalliskipan. Hetta økir um tryggleikan og møguleikan at verða verandi í egnum heimi.

Somuleiðis má samansetingin av starvsfólkum- á eldrasambýlunum, sum í veruleikanum eru smá røktarheim, fáast í trygga legu.

Fólkapensjónin skal styrkjast og samhaldsfasta eftirlønarskipanin gerast munagóð fyri allan arbeiðsmarknaðin.

Við fólkapensjónini og samhaldsfasta skulu stakir pensjonistar koma uppá 10.000 krónur og pensjonistahjún upp á 16.000 krónur um mánaðin.

Vit kunnu ikki longur hyggja at, meðan støðan hjá okkara gomlu og sjúku stendur við og versnar, meðan hugt verður aðrar vegir, men einki verður gjørt. Eldrapolitikkur má aftur á dagsskránna, tí vit skylda teimum, ið gingu undan, virðilig kor.o

# Samband er fyritreytin fyri frælsi

**Ólavur Rasmussen**
*Valevni Tjóðveldisfloksins í Suðuroy*



Eitt av vandamiklastu vápnunum í politikki, eins og millum menniskju, eru fordómar. Lat meg tí avhøvda ein av hesum fordómum straks: fordómin um, at sjálvstýrisfólk ikki kunnu halda nógv av danska fólkinum og Danmark. Hópurin av føroyingum lesur ella hevur lisið í Danmark (sjálvur havi eg lisið ein part á donskum universitetum), fær sjúkraviðgerð í Danmark (hetta rinda vit sjálvi), hevur familju í Danmark (sjálvur havi eg ein systir, sum er gift einum dana), hevur vinir í Danmark (sjálvur havi eg ikki tal á mínum donsku vinum), lesur danskar bókmentir og danska søgu. Og allir føroyingar kenna vit danir, sum eru búsitandi í Føroyum, fólk, sum vit halda nógv av - fólk, sum seta eyka lit á okkara samfelag.

Men hetta merkir ikki, at útheimurin stegðar upp á Langeland. Eingin tjóð, hvørki Danmark, tíansheldur einar frælsar Føroyar, klára seg uttan samband og samstarv við umheimin. Nógvir føroyingar hava, sum sagt, havt stórt gagn av at lesa niðri. Men góðu føroyingar, uttan fyri Danmark er ein stórur, spennandi heimur, við veldugum avbjóðingum. Tað finnast eisini universitet í øðrum londum enn Danmark, nógv av teimum á so høgum støði, at danskir ungdómar leita sær burtur til tess at menna seg. Tað sama gera alt fleiri føroyskir unglingar. Hesar ungdómar lata seg ikki niðurbinda av gravsálmunum um, at víðka vit um sjónarringin, so gloyma vit, at Danmark er heimsins nalvi!

Skal eg siga sum er havi eg fingið nóg mikið av hesum heimføðisliga jabbinum, sum er ein háðan bæði móti ungdóminum og okkara sjófólki, sum vóru teir fyrstu, ið brutu sjógv til tess at víka um sjónarringin hjá føroyingum. Sjófólk okkara sigldi um høv og um fremmandar leiðir og ruddaði slóð fyri alheimssambandi, meðan mappufrensarnir á landi grótu eftir donskuboppu - ein grátur og ein jammur, sum enn er at hoyra og síggja í bløðunum, hvønn einasta dag.

Jú, Danmark er eitt gott land og danska fólkið eitt hampafólk. Og tað eru ongar ætlanir um at kvetta sambandið við danska fólkið eftir at Føroyar eru vorðnar sjálvstøðugar. Men eitt er at hava samband millum oyrini, og æðrarnar fyltar við donskum budingi, so kíkurin stendur at bresta av neyðarrópum, nakað heilt annað at hava samband við aðrar tjóðar sum stavnhald fyri einum frælsum Føroyum. Vit eiga at møta øðrum londum, eisini Danmark, við virðing - tað gera vit einans sum sjálvstøðugt land. Tá kunnu vit av røttum kalla aðrar tjóðir, eisini Danmark, brøðrartjóðir.

**Samband er fyritreytin fyri frælsi**

Eitt av vandamiklastu vápnunum í politikki, eins og millum menniskju, eru fordómar. Lat meg tí avhøvda ein av hesum fordómum straks: fordómin um, at sjálvstýrisfólk ikki kunnu halda nógv av danska fólkinum og Danmark. Hópurin av føroyingum lesur ella hevur lisið í Danmark (sjálvur havi eg lisið ein part á donskum universitetum), fær sjúkraviðgerð í Danmark (hetta rinda vit sjálvi), hevur familju í Danmark (sjálvur havi eg ein systir, sum er gift einum dana), hevur vinir í Danmark (sjálvur havi eg ikki tal á mínum donsku vinum). Og allir føroyingar kenna vit danir, sum eru búsitandi í Føroyum, fólk, sum vit halda nógv av - fólk, sum seta eyka lit á okkara samfelag.

Eingin tjóð, hvørki Danmark, tíansheldur einar frælsar Føroyar, klára seg uttan samband og samstarv við umheimin. Nógvir føroyingar hava, sum sagt, hava stórt gagn av at lesa niðri. Men góðu føroyingar, uttan fyri Danmark er ein stórur, spennandi heimur, við veldugum avbjóðingum. Tað finnast eisini universitet í øðrum londum enn Danmark, nógv av teimum á so høgum støði, at danskir ungdómar leita sær burtur til tess at menna seg. Tað sama gera alt fleiri føroyskir unglingar. Hesar ungdómar lata seg ikki niðurbinda av gravsálmunum um, at víðka vit um sjónarringin, so gloyma vit, at Danmark er heimsins nalvi!

Skal eg siga sum er havi eg fingið nóg mikið av hesum heimføðisliga jabbinum, sum er ein háðan bæði móti ungdóminum og okkara sjófólki, sum vóru teir fyrstu, ið brutu sjógv til tess at víðka um sjónarringin hjá føroyingum. Sjófólk okkara sigldi um høv og um fremmandar leiðir og ruddaði slóð fyri alheimssambandi, meðan mappufrensarnir á landi grótu eftir donskuboppu - ein grátur og ein jammur, sum enn er at hoyra og síggja í bløðunum, hvønn einasta dag.

Jú, Danmark er eitt gott land og danska fólkið eitt hampafólk. Og tað eru ongar ætlanir um at kvetta sambandið við danska fólkið eftir at Føroyar eru vorðnar sjálvstøðugar. Tvørturímóti. Men eitt er at hava samband millum oyrini, og æðrarnar fyltar við donskum budingi, so kíkurin stendur at bresta av neyðarrópum, nakað heilt annað at hava samband við aðrar tjóðar sum stavnhald fyri einum frælsum Føroyum. Vit eiga at møta øðrum londum, eisini Danmark, við virðing - tað gera vit einans sum sjálvstøðugt land. Tá kunnu vit av røttum kalla aðrar tjóðir, eisini Danmark, brøðratjóðir.

# Fólkaskúlin má fáa frið!

**Katrin Dahl Jakobsen**
*løgtingslimur og valevni fyri Javnaðarflokkin*



Tað skal vera eitt av okkara fremstu ynskjum. At umsitingin av fólkaskúlanum kemur í aftur røttu leguna, sum fer at bera dám av góðvilja, og ikki sum hesi seinastu fýra árini, av klandri og stríð. Fólkaskúlin er týdningarmesti lærustovnurin og støðið undir øllum okkara førleika. Eyðkenni eigur at vera menning og ikki kaos.

Men umstøðurnar at skapa góð viðurskifti hava ikki verið tær bestu. Tey flestu munnu halda, tað hevði verið óhugsandi, at ein skúli hevði fýra leiðslur eftir fýra árum. Men hetta hevur allur føroyski fólkaskúlin verið noyddur at liva við. At ovasta leiðsla fyri skúlaverkinum, landsstýrismaðurin, hevur verið so mikið ódrúgv, at fýra landsstýrismenn hava røkt hetta starvið hesi fýra árini, setir sjálvandi síni spor. Tað má ikki henda aftur! Slíkt arbeiðslag slóðar ikki fyri framhaldandi menning. Tvørturímóti hevur Mentamálastýrið sett klandursmet við fólkaskúlan hetta skeiðið. Fíggjarmálastýrið eigur tó sín lut í hesum ivasama heiðuri, tá teir ikki hava hildið gjørdar avtalur.

Tað kom illa við, at føroyski fólkaskúlin varð raktur av verkfalli útvið tveir mánaðir. Tað kom eisini illa við, at eftirútbúgvingin av lærarum varð strikað, uttan at annað tá varð sett ístaðin. Hetta hoyrir ikki nútíðini til.

Tað kom illa við, at Strandferðslan tók aftur tað sindrið av ferðastuðuli, sum var til skúlaflokkar. Sjálvandi eiga skúlaflokkar at ferðast heilt ókeypis, tá ferðin er liður í undirvísingini. At nýggja tímabýtið ikki gagnaði stóru skúlunum í Havn, at handaligu lærugreinirnar ikki verða røktar, at næm. við serligum tørvi ikki fingu betri umstøður, og vit kundu nevnt mangt annað. Nógv arbeið liggur at taka upp hjá eini komandi samgongu, ikki minst í fólkaskúlanum. Fyrst at tryggja , at fólkaskúlin fær framt tað, honum er álagt. Harafturat arbeiða fyri miðvísari menning og betri arbeiðsumstøðum fyri lærarar. Javnaðarflokkurin vil verja og ikki berjast við fólkaskúlan.

## Valtilfar í Sosialinum

Treytir fyri upptøku av valgreinum er, at tilfarið verður latið okkum sum teldupostur ella á diskli. Prísurin er hálvur lýsingarprísur.

Fyri valgreinar á valsíðuni í Internet-Sosialinum er prísurin 50 kr fyri hvørja grein, um ikki onnur avtala er gjørd við flokkarnar.

*Sosialurin*



# Westward Ho verður sum nýggj



*Hon sær ikki út av nógvum, Westward Ho, sluppin frá 1884. Nú skal hon sleipast til Skotland, har hon fær eina høvuðsumvæling*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Gamla sluppin frá 1884 skal hava eina høvuðsumvæling. Skrokkurin skal styrkjast og nýtt dekk gerast. Í næstu viku verður sluppin sleipað til Skotland á eina skipasmiðju í Fraserburgh, sum umvælir træskip**

SKIP
*Stefan í Skorini*

Westward Ho hevur ligið við bryggju í Havn í nøkur ár. Hon er í ringum standi, og tørvur er á eini høvuðsumvæling. Grunnurin Sluppin, sum eigur Westward Ho, hevur nú tikið stig til at umvæla sluppina.

Jónsvein Lamhauge, havnameistari, er formaður í grunninum, og hann sigur, at sluppin verður sleipað niður til Skotland einaferð í næstu viku. Ætlanin er at fáa Vaktar- og Bjargingartænastuna at gera hetta, men av tí at bæði Brimil og Tjaldrið liggja við bryggju vegna verkfall, er tað møguligt, at hetta verður útsett nakrar dagar.

Umvælingin er rættiliga umfatandi og fer at kosta grunninum einar tvær milliónir krónur. Fleiri av bondunum í skrokkinum skulu skiftast út, og spildurnýtt dekk skal eisini gerast. Harumframt skulu fleiri bjálkar undir dekkinum og í skipinum, sum eru illa farnir, skiftast út.

Síðani skal alt skipið innrættast av nýggjum, tí alt skal tømast innanúr eisini. Hetta arbeiðið verður gjørt í Føroyum, og Jónsvein vónar, at fáa sjálvbodna arbeiðsmegi at innrætta skipið. Innrættingin fer óivað at kosta nakrar hundrað túsund krónur.

Westward Ho hevur ligið á beding á Tórshavnar Skipasmiðju, har fólk hava tett øll hol, og gjørt klárt at seta fast, so hon er klár til túrin niður til Skotland.

## Partur av søguni

Spurningurin er so, um tað loysir seg at seta eitt so gamal skip í stand.

– Tað er avgjørt neyðugt at varðveita hetta skipið, tí hon umboðar eitt sera týdningarmikið tíðarskeið í søgu Føroya, tí tað var við sluppum, at føroyingar fóru undir at veruligt havfiskarí, sigur Jónsvein Lamhauge.

Hann sigur, at henda umvælingin verður mett sum ein íløga. Skipið verður sum nýtt eftir umvælingina, og tá er grundarlag fyri at vinna nakað av peningi innaftur í grunnin, sum er heldur tómur eftir hetta risa takið.

Sluppin verður væntandi aftur at síggja í Føroyum einaferð í heyst, tá arbeiðið eftir ætlan skal vera liðugt. Tó er møguleiki fyri, at hon ikki kemur aftur til Føroyar fyrr enn næsta vár. Jónsvein sigur, at tey ikki fara at sleipa hana til Føroyar á vetri.

Westward Ho er bygd í 1884 í Grimsby í Englandi. Thomsen á Tvøroyri keypti sluppina til Føroyar í 1895, tá hon skifti navn til Viking. Í 1908 skifti hon aftur til upprunaliga navnið.

Í 1967 keypti grunnurin sluppina frá felagnum hjá Thomsen. Tá hevði sluppin verið í vinnuligari sigling heilt fram til 1966. Longu í 1968 var hon aftur í sigling.

Tvær aðrar sluppir eru í Føroyum í dag. Johanna, sum er javngomul við Westward Ho, og Norðlýsið, sum er bygd í 1945.




Um hóskandi boð fæst,verður M/S "Grunningur" seldur við loyvum




Áhugaði kunna venda sær til
TOR SHIPPING
tlf. 318531
ella 218532
Niels Finsensgøta 23 · Box 1252 · 110 Tórshavn